UTTAN ÚR HEIMI

# AIDS er ikki ein sjúka

**Fyrrverandi suðurafrikanski forsetin Nelson Mandela er í Noregi, har hann millum annað roynir at savna pengar til bardagan ímóti AIDS**

AIDS
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*



*Nelson Mandela: -Aids er ikki ein sjúka*

Síðani hann legði forsetaembætið frá sær, hevur Nelson Mandela verið ein av teimum fremstu stríðsmonnunum í bardaganum ímóti AIDS. Kanska ikki so løgið, tí sjálvur hevur hann mist ein son av sjúkuni, og Suðurafrika er eisini eitt av teimum ringast raktu londunum. Men hansara stríð er ikki bara eitt stríð ímóti einari sjúku.

- AIDS er ikki ein sjúka, men ein spurningur um mannarættindi. Tað einasta, sum krevst, er viljin til at gera tað neyðuga, er boðskapurin hjá Mandela.

Av teimum 40 milliónunum, sum eru HIV-smittað, búgva 28 milliónir í londunum sunnan fyri Sahara. Á hvørjum ári verða 3,5 milliónir fólk smittað í Afrika, og tríggjar milliónir doyggja av sjúkuni á hvørjum ári. Avleiðingin er, at í teimum ringast raktu londunum er meðal livialdurin niðan fyri 40 ár.

Tað er Arbeiðaraflokkurin, sum hevur boðið tí 86 ára gamla Mandela til Noregs. Í dag skal hann til Tromsø, har skipað er fyri stórari konsert honum til heiðurs.

# Fyrsta ódnin á veg

**Amerikanskir veðurmenn vænta nógvar ódnir í Karibiska Havinum í ár, og tann fyrsta er á veg**

ILLVEÐUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Amerikanski veðurstovnurin kunngjørdi herfyri, at tær tropisku ódnirnar í Karibiska Havinum verða væntandi fleiri í ár enn í fjør. Í fjør skrásettu veðurmenninir 15 sokallaðar tropiskar stormar, og níggju teirra gjørdust seinni til tropiskar ódnir.

Tann fyrsti tropiski stormurin í ár tók seg upp í Atlantshavinum hósdagin, og í gjár skuldi hann ætlandi raka vestara part av Kuba. Har høvdu myndugleikarnir ávarað fólk, og nógv høvdu fingið boð um at leita sær skjól.



*Kubanar noyddust at standa undir regnskjóli, meðan teir bíðaðu eftir Arlene*

# Mr. Bean mótmælir lóg

Bretski sjónleikarin Rowan Atkinson, ið tey flestu kenna sum Mr. Bean, er í øðini inn á stjórnina í London, tí hon fyrireikar eina lóg, sum skal gera tað revsivert at skemta sær við átrúnaðarligum viðurskiftum. Hann og onnur halda, at lógin er eitt álop á talifrælsið.

Mr. Bean var eisini ímillum teirra, sum mótmæltu einum tilsvarandi uppskoti í fjør, men tá bleiv uppskotið ikki samtykt, tí Yvirhúsið segði nei. Nú roynir stjórnin so aftur, men tað ger Mr. Bean eisini.

## Hann verður sitandi

Amerikanska stjórnin hevur roynt at forða fyri, at egyptin Mohamed ElBaradei slapp at halda fram sum leiðari í altjóða kjarnorkustovninum IAEA, men nú hevur Washington slakað.

Starvstíðin hjá ElBaradei er úti í summar. Hetta er annað skeið hansara í leiðarastarvinum, men ST mælti til, at hann skal halda fram. Bara USA ivaðist. Condoleezza Rice, uttanríkisráðharri, segði mikudagin, at eftir hennara tykki eigur ein leiðari ikki at sita í einum so týðandi starvi meiri enn tvey skeið, men hon legði afturat, at stjórnin í Washington hevur gjørt av at lata ElBaradei halda fram.

Mohamed ElBaradei er ikki so væl lýddur í Washington, tí hann hevur funnist at, at USA nýtti sera ivasamar upplýsingar sum grundarlag fyri álopinum á Irak. Sjálvur helt hann, at vápnaeftirlitsmenninir hjá ST áttu at fáa betri tíð til sínar kanningar í Irak.

Ein onnur orsøk til, at hann ikki er so væl umtóktur í Washington, er, at sambært amerikonsku stjórnini hevur ElBaradei ikki lagt nóg stórt trýst á leiðararnar í Iran fyri at fáa teir at sleppa kjarnorkuverkætlanini.

## ANC í trupulleikum

Stjórnarflokkurin í Suðurafrika, ANC, er komin í álvarssamar trupulleikar, eftir at fremsti ráðgevin hjá landsins varaforseta hevur fingið 15 ára fongsul fyri svik.

Handilsmaðurin Schabir Shaik hevur verið fíggjarráðgevi hjá Jacob Zuma, varaforseta, og undir rættarmálinum kom fram, at varaforsetin var vitandi um partar av tí ólógliga virksemið hjá ráðgevanum. Tað hevur fingið andstøðuna og teir suðurafrikonsku fjølmiðlarnar at krevja, at varaforsetin fer frá, samstundis sum málið verður kannað nærri. Andstøðan og fjølmiðlarnir siga eisini, at Suðurafrika kann ikki møta umheiminum við einum varaforseta, sum er settur í samband við svik, og at viðurskiftini eru ein hóttan ímóti tí unga demokratiinum.

Fyribils er tó einki, sum bendir á, at varaforsetin verður frákoyrdur. Jacob Zuma er væl umtóktur ímillum tað unga fólkið. Harafturat er hann av zulu-fólkinum og fær dyggan stuðul frá teimum, og hesum stuðuli hevur ANC brúk fyri, skrivar AP.

## Gamalt mál tikið uppaftur

Italska ákæruvaldið krevur, at tíggju týskarar, sum vóru í einari SS-deild í Norðuritalia í 1944, skulu dragast fyri rættin.

Teir tíggju menninir vóru partur av einari SS-deild, sum myrdi fleiri hundrað fólk í einari bygd í Norðuritalia í august í 1944. Týskararnir leitaðu eftir italskum uppreistrarmonnum, og í bygdini SantAnna di Stazzema myrdu teir umleið 500 fólk. Eyngavitni hava greitt frá, at fólk vórðu sett í røðir og síðani skotin, og onnur vórðu stúgvað saman og síðani sprongd í luftina við hondgranatum.

Italska ákæruvaldið sigur, at tíggju menn skipaðu fyri hópmorðinum í SantAnna di Stazzema. Ákærin, Marco De Paolis, vil vera við, at teir tíggju menninir búgva framvegis í Týsklandi, og hann hevur kravt, at teir fáa lívlanga fongsulsrevsing.

## Vandamikið starv

Mikudagin tók Alejandro Dominguez við starvinum sum løgregluovasti í meksikanska býnum Nuevo Laredo, men tað skuldi hann ongantíð havt gjørt. Níggju tímar seinni bleiv hann myrdur.

Nuevo Laredo er tætt við markið ímillum Meksiko og USA, og býurin verður hildin at vera ein týðandi millumstøð í rúsevnahandlinum um markið. Tað hevur havt við sær, at fleiri smuglaralið berjast um valdið í býnum, og tey hava ikki minstu virðing fyri løgregluni. Sambært AP hava umleið 60 fólk latið lív í samanbrestum í býnum teir seinastu mánaðarnar, og teirra millum vóru fleiri løgreglumenn.

Alejandro Dominguez var einasti umsøkjari til starvið sum løgregluovasti í Nuevo Laredo, og tað verða neyvan fleiri, sum fara at søkja um at taka við eftir hann.